

# Renning fyri øll

Hóskvøldið kl. 18 verður fyrsta tiltakið á Eystanstevnuni.

Talan er um eitt rørslutiltak, sum vendir sær til øll fólk og í øllum aldursbólkum, eisini fólk við barnavogni ella koyristóli. Runnið ella gingið verður 2,4 ella 4,2 km.

Byrjað verður við Ítróttarhøllina í Runavík, og málið er eisini Ítróttarhøllin, har fyrireikararnir bjóða frukt frá Brotinum og vatn frá Føroya Bjór.

Blusur við stuðlum á verða býttar út til allar luttakararnar áðrenn byrjað verður. Stuðlarnir eru Shop Inn, Berglon, Kev, Effo, Føroya Tele og Eysturoyar Teoriskúli.

Johan Danielsen í Lamba bjóðar vælkomin og setur renningina í gongd.



*Tey sum hava havt framførslur í Løkshøll, lata sera væl at ljóði og umstøðum annars. Her er sangbólkurin Vitin í aktión*



*Hallur Joensen sang fríggjadagin uttandura í Klaksvík, og verður nú at hoyra innandura í Løkshøll.*

# Spennandi gospel-konsert í Runavík

## Fríggjakvøldið 18 juni skipar Eystanstevnunevndin fyri stórari gospelkonsert í Løkshøll í Runavík.

Talan verður um eina sera forkunnuga konsert, har Hallur Joensen, Sirikit Jacobsen, TOS og ikki minst trioin Bill Justinussen, Torbjørn Jacobsen og Jógvan á Lakjuni luttaka.

Sum nakað heilt serligt, fáa áhoyrararnir høvið til, fyri fyrstu ferð, at hoyra Hallur Joensen framføra úr síni Country gospel sangskrá. Annars hevur Hallur Joensen áður framført gospel saman við Kristinu Bærentsen til ymisk tiltøk, og verður Kristina eisini ein partur av framførsluni hjá Hallur hesa ferð.

Sirikit Jacobsen hevur júst givið vælumtóktu fløguna »Lyftið« út, og hava sangir av hesari fløgu verið nógv at hoyrt seinastu tíðina í loftmiðlunum.

TOS við Bárði á Lakjuni á odda, hava seinastu tíðina verið nógv at hoyrt á ymiskum tiltøkum, seinast á Fjarðafestivalinum, og fingu teir framúr góð ummæli, serliga fyri teirra sera kreativu framførslu. TOS er á veg við nýggjari fløgu, sum kemur út seinni í summar.

Bill Justinussen og Torbjørn Jacobsen hava sungið saman til fleiri tiltøk seinastu árini, og hava til hesa konsertina fingið Jógvan á Lakjuni at leika á klaverið saman við teimum.

Fyrireikararnir vænta nógv fólk til konsertina, og vegna avmarkaða atgongd, heita teir á fólk um at keypa sær atgongumerkið, sum kostar 150 krónur, í góðari tíð.

snorri@sosialurin.fo

# Finna Føroya dugnaligastu hundar

FCH – Føroya Civila Hundaførarafelag – er eitt nýtt hundafelag, ið veitir hundavenjing til øll hundaáhugað.

Ætlanin er at kappast á hvørjari FM-stevnu og restina av summarinum, soleiðis at Føroya dugnaligastu hundar verða funnir. Eystanstevnan er annað umfar í hesum liði, og medaljuhandan verður eisini til trý tey bestu í hvørjari grein.

Kappast verður í Lýdni, Rally Lýdni, byrjanar Agility og Agility vand.

FCH verður á fótbóltsvøllinum við Løkin í Runavík sunnudagin kl. 17.